LØGTINGSGRANNSKOÐARARNIR

Føroya Løgting.

**Løgtingsmál nr. 69/2008: Grannskoðan av almennum roknskapum**

Uppskot
til
samtyktar

Vísandi til frágreiðing niðanfyri samtykkir Løgtingið at góðkenna roknskapin hjá **Húsalánsgrunninum** fyri fíggjarárið **2007**.

## FRÁGREIÐING FRÁ LØGTINGSGRANNSKOÐARUNUM:

## 1. Lógargrundarlag

Lógargrundarlagið fyri Húsalánsgrunnin er Ll. nr. 118 frá 18. juni 1997 "um Húsalánsgrunn o.a." Umframt Húsalánsgrunnin fevnir lógin eisini um Bjálvingarstuðulslánsgrunnin og Íbúðagrunnin. Við heimild í lógini lýsti Landsstýrið 28. apríl 1998 kunngerð nr. 55 "um Húsalánsgrunn o.a."

### 1.1 Endamál

Húsalánsgrunnurin hevur til endamáls at veita lán at byggja og keypa sethús ella íbúðir, og kann sambært § 5 veita hesi lán:

1. Stuttfreistað lán at keypa grundøki.
2. Byggilán at byggja ella umbyggja nýggj sethús ella íbúð, avmarkað til ta upphædd, ið grunnurin veitir sum veðskuldarlán.
3. Veðskuldarlán til nýggj sethús ella íbúð.
4. Veðskuldarlán at keypa sethús ella íbúð.
5. Veðskuldarlán til at endurnýggja, umbyggja og bjálva sethús ella íbúð.

Í kunngerðini eru lýstar neyvari reglur um lán og lánstreytir.

### 1.2 Fyrisiting

Sambært § 3 í lógini verður grunnurin fyrisitin av einum stýri við 3 limum og 3 tiltakslimum, sum landsstýrismaðurin tilnevnir fyri 4 ár. Stýrið setir stjóra at taka sær av dagligu um- og fyrisitingini, og ásetir við landsstýrisins góðkenning hansara lønar- og setanartreytir. Í Stýrinum sita: John Færø, Klaksvík, formaður, Gurið Joensen, Tórshavn og Tórálvur Weihe, Tórshavn. Eingir tiltakslimir eru valdir.

## 2. Fíggjarviðurskifti

Inntøkurnar hjá Húsalánsgrunninum eru rentuinntøkur av veittum lánum. Fíggjarárini 1982/83-1992 vórðu tilsamans 205 mió.kr. játtaðar á fíggjarlógini, og harafturat fekk Húsalánsgrunnurin í 1994 eftirgivið lán úr Oljugrunninum 57,5 mió.kr.

Við heimild í Ll. nr. 28/1995 "um lán til Húsalánsgrunnin" lænti grunnurin í 1995 50 mió. kr. úr landskassanum. Við árslok 2007 er restskuldin 3,6 mió.kr.

## 3. Roknskaparviðurskifti

Til tess at kunna Løgtingið um fíggjarligu gongdina, er niðanfyri gjørdur ein samandráttur av ársroknskapinum fyri 2007, og til samanberingar eru roknskapartølini fyri árini 1991, 1996, 2001 og 2006.

### 3.1 Roknskapartøl 1991, 1996, 2001 og 2006 - 2007

mió.kr.

| **Rakstur** | **2007** | **2006** | **2001** | **1996** | **1991** |
|---|---|---|---|---|---|
| Rentuinntøkur | 19,4 | 11,8 | 25,2 | 45,4 | 67,7 |
| Rentuútreiðslur og kurstap | -0,5 | -0,7 | -2,1 | -25,9 | -50,9 |
| **Netto rentuinntøkur og kursjavnan** | **18,9** | **11,1** | **23,1** | **19,5** | **16,8** |
| Rakstrarútreiðslur | -5,0 | -5,3 | -5,9 | -5,5 | -10,2 |
| Av- og niðurskrivingar av fastogn | -0,3 | -0,4 | -0,3 | -0,8 | 0,0 |
| Avskrivað og sett av móti tapi | 7,3 | 7,6 | 3,7 | 7,6 | -6,0 |
| Óvanligar útreiðslur/inntøkur | 0,0 | 0,0 | -1,5 | 0,0 | 0,0 |
| **Rakstrarúrslit** | **20,9** | **13,0** | **19,1** | **20,8** | **0,6** |

| **Fíggjarstøða** | **2007** | **2006** | **2001** | **1996** | **1991** |
|---|---|---|---|---|---|
| **Aktiv** | | | | | |
| Veðbrøv, útlán | 144,9 | 157,4 | 349,5 | 599,7 | 767,8 |
| - sett av móti tapi | -20,3 | -26,1 | -93,6 | -228,7 | -6,0 |
| **Netto útlán** | **124,6** | **131,3** | **255,9** | **371,0** | **761,8** |
| Innlánspeningur | 170,3 | 170,4 | 72,0 | 109,1 | 16,8 |
| Virðisbrøv | 170,4 | 145,4 | 10,6 | 0,7 | 2,9 |
| Millumrokningar | 14,6 | 13,9 | 13,2 | 0,0 | 0,0 |
| Onnur ogn | 6,3 | 7,5 | 14,2 | 40,5 | 34,1 |
| **Aktiv tilsamans** | **486,2** | **468,5** | **365,9** | **521,3** | **815,6** |
| **Passiv** | | | | | |
| Lán innanlands | 4,4 | 7,5 | 25,9 | 124,7 | 200,4 |
| Lán uttanlands | 0,0 | 0,0 | 2,2 | 233,6 | 275,5 |
| Onnur skuld | 0,1 | 0,2 | 0,3 | 18,4 | 20,1 |
| **Skuld tilsamans** | **4,5** | **7,7** | **28,4** | **376,7** | **496,0** |
| **Eginogn:** | | | | | |
| Eginogn við ársbyrjan | 460,8 | 447,8 | 318,4 | 116,4 | 323,9 |
| Rakstrarúrslit | 20,9 | 13,0 | 19,1 | 20,8 | 0,6 |
| Aðrar javningar | 0,0 | 0,0 | 0,0 | 7,4 | -4,9 |
| **Eginogn tilsamans** | **481,7** | **460,8** | **337,5** | **144,6** | **319,6** |
| **Passiv tilsamans** | **486,2** | **468,5** | **365,9** | **521,3** | **815,6** |

## 3.2 Gongdin síðani 1991




Mynd 1

Síðani kreppuna í nítiárunum hevur Húsalánsgrunnurin bert í lítlan mun veitt nýggj lán. Myndin frammanfyri (mynd 1) sýnir m.a. gongdina í netto útlánunum. Við ársenda 1991 vóru netto útlánini 761,8 mió.kr., og við ársenda 2007 eru tey lækkað til 124,6 mió.kr.

Húsalánsgrunnurin hevur greitt frá, at orsøkin til stóru lækkingina í 1992 og 1993 er, at í 1992 vóru 141 mió. kr. avskrivaðar sum tap, og við endan av 1993 vóru uppaftur 138 mió. kr. avsettar móti framhaldandi tapi. Eftir tað hava peningastovnarnir eisini tikið yvir ein part av útlánunum hjá Húsalánsgrunninum.

Húsalánsgrunnurin greiðir eisini frá, at brutto útlánini við árslok 1998 vóru 409,8 mió. kr. og við árslok 2007 vóru tey 144,9 mió. kr., ella ein lækking uppá 264,9 mió. kr.

Við ársenda 1991 var skuldin hjá Húsalánsgrunninum 496 mió.kr. og í 1992 hækkaði hon til 614,9 mió.kr. Síðani er skuldin minkað, og við ársenda 1998 var hon komin niður á 69,6 mió.kr. og í 2007 4,5 mió.kr.

Á mynd 1 sæst eisini gongdin í gjaldførinum, sum stendur á innlánskontum, og er sett í virðisbrøv. Frá 1991 til 1998 var gjaldførið rættiliga støðugt millum 19 og 110 mió. kr. Frá 1998 er gjaldførið støðugt hækkað, og við ársenda 2007 var tað 340,7 mió.kr.

Tað sum kann lesast út frá myndini er, at frá 1991 til 1998 hevur Húsalánsgrunnurin goldið sína skuld aftur við umleið somu ferð sum útlánini eru lækkað. Í sama tíðarskeiði er gjaldførið støðugt. Frá 1998 er meginparturin av skuldini afturgoldin, og so hvørt sum útlánini verða goldin aftur, veksur gjaldførið samsvarandi. Tað vil siga, at heldur gongdin fram sum nú, at Húsalánsgrunnurin ikki fer at lata nýggj lán í størri mun enn nú, verða øll útlánini goldin aftur um nøkur ár, og høvuðs aktiviteturin hjá Húsaláns-grunnurin verður at umsita gjaldføri.




Mynd 2

Í tráð við tað, sum er greitt frá frammanfyri, sæst sama gongd á mynd 2. Har sæst, at síðst í nítiárunum komu um 90% av inntøkunum hjá Húsalánsgrunninum frá rentu-inntøkum av útlánum. Í 2007 komu um 35% av inntøkunum frá rentuinntøkum av útlánum. Orsøkin til gongdina er, at so hvørt sum útlánini lækka, kemur alsamt størri partur av inntøkunum frá gjaldførinum, tvs. rentuinntøkur av innláni og vinningur av virðisbrøvum.

## 4. Ársroknskapur 2007

Ársroknskapurin skal sambært § 31 í lógini verða grannskoðaður av løggildum grann-skoðara, og skal síðani verða sendur Landsstýrinum við frágreiðing og viðmerkingum frá Stýrinum.

### 4.1 <u>Ársfrágreiðing</u>

Í ársfrágreiðingini í ársroknskapinum 2007, sum er dagfest 17. apríl 2008, vísir Stýrið m.a. á:

> *"Húsalánsgrunnurin varð í 1964 stovnaður við tí endamáli at skapa betri fyritreytir hjá fólki at seta búgv, har tað almenna gjøgnum grunnin átók sær partar av bústaðarfíggingini, sum annars ikki var møguleiki fyri. Á henda hátt er eisini ein almennur bústaðarpolitikkur lagdur fyri dagin.*
>
> *Útboðið av fígging hevur verið sera stórt seinastu árini, og hørð kapping er um kundarnar í peningastovnunum. Sethúsaeigarar hava eisini fingið fyrimunur av hesum, men kann talan lættliga verða um ein løtuvinng, nú rentan á sethúsalánum hækkar aftur. Høgu sethúsaprísirnir, skáalán og avdráttarfrí lán kunnu í ringsta føri gera tað sera trupult, um ikki fíggjarligt rásarúm er til avsetingar til viðlíkahald v.m. av ognini.*
>
> *Húsalánsgrunnurin hevur ikki ligið óvirkin hesi árini síðani kreppuna í nítiárunum, sum alment hevur verið sagt, men manglandi politisk atlit hava forðað fyri virksemi grunsins. Fíggjarliga er Húsalánsgrunnurin førur fyri at luttaka í bústaðarfíggingini á eins lagaligan hátt sum peningastovnar, við tilboðum um heildarfígging, skáalán og avdráttarfrí lán, men hevur grunnurin ikki møguleika fyri hesum, grundað á tær í kunngerðini fyri Húsalánsgrunnin nevndu útlánsreglur.*

*Húsalánsgrunnurin hevur tó í árinum, í tann mun tað eftir lóg og reglum hevur verið gjørligt, fíggjað og umfíggjað bústaðir í Føroyum.*

*Hóast rentustigið er lægst í Húsalánsgrunninum, eru sethúseigarar noyddir at taka av tilboðum um heildarfígging, skáalán ella avdráttarfríum láni frá peningastovni. Sethúsaeigarin er soleiðis bundin á hond og fót, har bústaðar,- privat- og vinnulán eru tvinnað saman.*

*Sum tað áður hevur verið víst á, so eigur Húsalánsgrunnurin at verða eitt búskapar-politiskt amboð hjá landsins myndugleikum.*

*Í tíðum við sera stórari búskaparframgongd, har privatir peningastovnar hava metúrslit, og nógvur likviditetur er í umfarið, kann tað tykjast, sum at grunsins uppgáva ella endamál ikki er so eyðsýnt, og at tað privata útboðið klárar at nøkta tørvin hjá fólki til bústaðarfígging.*

*Tað er tó øllum kunnugt, at tíðirnar skifta, og tá útboðið av fígging ikki er so stórt sum í løtuni, er Húsalánsgrunnurin ein trygd fyri, at tað almenna kann átaka sær partur av bústaðarfíggingini, sum annars ikki er møguleiki fyri.*

*Húsalánsgrunnurin er eisini ein trygd fyri, at fígging kann fáast, tað veri seg til eldra-íbúðir, lestrabýli, sambýlir, íbúðir til fólk við serligum tørvi o.a., har teir privatu fíggingarstovnarnir ikki røkka ella ynskja at fíggja.*

*Sum fíggjarliga støðan hevur verið í 2007, hevur Húsalánsgrunnurin ikki verið við í fíggingini av nógvum bústaðum, men sum fíggjarligu útlitini eru fyri framman, er givið, at tað framhaldandi er brúk fyri Húsalánsgrunninum.*

*Landsmyndugleikarnir hava arbeitt við einum bústaðarpakka, sum inniheldur annað enn viðurskiftini um Húsalánsgrunnin, Íbúðagrunnin og Bjálvingarstuðulslánsgrunn-in, tað vera seg um nýggja leigu,- rentu- og mvg-lóggavu og lóg um íbúðalutafeløg.*

*Tað er at fegnast yvir, at hesi viðurskifti koma í eina fasta legu, men hesin parturin av bústaðarpakkanum kann gerast, uttan at avtaka lógirnar um grunnarnar.*

*Frá politiskari síðu hevur tað í hesum sambandi verið boðað frá, at bygnaðurin fyri Húsalánsgrunnin, Íbúðagrunnin og Bjálvingarstuðulslánsgrunnin skal broytast. Einki ítøkiligt er tó hent við hesum viðurskiftum enn.*

*Tað er einki dulsmál, at slíkar fráboðanir ávirka tilverugrundarlagið hjá grunnunum, og er soleiðis ótolandi fyri stovnin, og ikki minst fyri starvsfólkini, sum liva í støðugari óvissu.”*

## 4.2 Roknskapargrannskoðanin

Løgtingsgrannskoðararnir skulu m.a. ansa eftir, at roknskapurin er rættur, og at tær av-gerðir, roknskapurin fevnir um, eru samsvarandi veittum játtanum, galdandi lógum og fyriskipanum. Arbeiðið hjá løgtingsgrannskoðarunum byggir m.a. á frágreiðing frá rokn-skapargrannskoðanini, Grannskoðaravirkinum Inpact, dagfest 17. apríl 2008. Sambært grannskoðanarfrágreiðingini var einki at finnast at.

# 5. Samskifti við landsstýrismannin

## 5.1 Endurskoðan av lóg og virksemi Húsalánsgrunsins

1996 Í ársfrágreiðingini í roknskapinum hjá Húsalánsgrunninum fyri 1996 varð boðað frá, at Húsalánsgrunnurin hevði ætlanir um at skipa so fyri, at møguleikar fóru at verða fyri alternativari íbúðabygging, t.v.s. smærri íbúðum til yngri, eldri og rørslutarnað.

1999 Í februar 1999 kunnaði landsstýrismaðurin um, at ætlanir vóru um at gera

ávísar broytingar í lógini, og at lógarbroytingarnar fóru at verða framdar í komandi tingsetuni.

Løgtingsgrannskoðararnir settu í 1999 spurnartekin við, um grunnurin tænti sínum upprunaliga endamáli. Húsalánsgrunnurin hevði tá onki sethúsalán veitt síðani 1994, og nógvir sethúsaeigarar høvdu goldið lán síni aftur, m.a. tí at rentan hevði verið hægri enn hjá øðrum peningastovnum.

2001 Í februar 2001 boðaði landsstýrismaðurin frá, at uppskot til nýggja lóg var um at verða liðugt, og fór væntandi at verða lagt fyri tingið fyrst í komandi tingsetuni.

2003 Í januar 2003 kunnaði landsstýrismaðurin um, at ein frágreiðing frá einum embætismannabólki, hvussu gongd kundi fáast á alternativa bústaðarbygging, fór at verða latin Løgtinginum til aðalorðaskiftis um miðjan februar 2003.

21. oktober 2003 var aðalorðaskifti á Løgtingi um frágreiðingina. 24. oktober 2003 kunnaði landsstýrismaðurin um, at hann hevði gjørt av at leggja Húsalánsgrunnin og Íbúðagrunnin saman. Sambært landsstýrismanninum var ikki liðugt viðgjørt politiskt, hvørjar uppgávur endurskipaði Húsaláns-grunnurin skuldi røkja, men væntandi fór lóggávuarbeiðið at verða liðugt í tingsetuni.

2004 Í januar 2004 kunnaði landsstýrismaðurin um, at av tí at løgtingsval varð útskrivað 5. desember 2003, var stígur komin í lóggávuarbeiðið.

2005 Í januar 2005 boðaði landsstýrismaðurin frá, at tá nýggja landsstýrið tók við, hevði hann givið fyrisitingini boð um at gera ávísar broytingar í ætlanunum, ið undanmaður hansara hevði arbeitt við. Tað arbeiðið varð liðugt í mai 2004. Síðani tá hevði málið verið til politiska viðgerð. Ein politiskur bólkur, við umboðum úr øllum samgonguflokkunum, var settur, sum saman við landsstýrismanninum skuldi finna fram til eina prinsipiella loysn á málinum. Hetta arbeiðið var ikki liðugt, men landsstýrismaðurin segði seg alla tíðina hava lagt áherðslu á týdningin av einari skjótari loysn.

2006 Í januar 2006 boðaði landsstýrismaðurin frá, at Húsaláns-, Íbúða- og Bjálvingarstuðulslánsgrunnurin skuldu verða umskipaðir til eitt partafelag, og skuldu halda fram við einum avmarkaðum virksemi. 2/3 av eiginognini hjá grunnunum skuldi harumframt takast úr partafelagnum, sum stovningargjald til landskassan.

Sambært landsstýrismanninum hevði stýrið fyri Húsalánsgrunnin víst á, at ongar fíggjarligar konsekvensútrokningar vóru gjørdar fyri, hvussu partafelagið rakstrarliga kundi hanga saman við hesum munandi skerda kapitali. Landsstýrismaðurin hevði ásannað, at fíggjarligi parturin var ikki nóg væl lýstur, og hevði tí boðað stýrinum fyri Húsalánsgrunnin frá, at hesi viðurskifti skuldu greinast nærri av einum óheftum útlendskum serfrøðingi, men enn var ikki gjørt av, hvør hann skuldi verða.

Landsstýrismaðurin legði afturat í svarskrivi sínum í januar 2006, at tað merkti ikki, at arbeiðið við at umskipa grunnarnar var steðgað upp. Hildið

varð fram við arbeiðinum at gera eina lóg um lutaíbúðafeløg, sum eftir ætlan skuldi verða liðug um umleið eitt ár.

2007 Í januar 2007 boðaði landsstýrismaðurin frá, at arbeitt varð við "Bústaðarpakkanum". Endurskipanin av Húsalánsgrunninum var ein partar av hesum pakka. Húsalánsgrunnurin, Íbúðagrunnurin og Bjálvingarstuðulslánsgrunnurin skuldu umskipast til eitt partafelag, og skuldu halda fram við einum avmarkaðum virksemi. Virksemi Húsalánsgrunsins fór m.a at fevna um lógina um lutaíbúðafeløg, sum væntandi fór at verða klár at leggja fyri Løgtingið á ólavsøku 2007. Almanna- og Heilsumálaráðið hevði gjørt avtalu við tveir útlendskar serfrøðingar um at gera eina lýsing av ætlaðu fíggjarligu og bygnaðarligu broytingunum hjá grunnunum. Hesir serfrøðingar fóru væntandi at verða lidnir við sítt arbeiði í mai 2007.

Í oktober 2007 kunnaði landsstýrismaðurin um, at eftir atfinningar frá Stýrinum fyri Húsalánsgrunnin hevði landsstýrismaðurin gjørt av at biðja tríggjar óheftar útlendskar serfrøðingar um at granska politisku ætlanirnar um bústaðarpakkan. Serfrøðingarnir høvdu gjørt eina tilráðing, og landsstýrismaðurin hevði fingið politiska undirtøku í samgonguni at fylgja hesari tilráðing. Húsalánsgrunnurin, í verandi líki, fór at verða tikin av og endurstovnaður sum ein sonevndur ábyrgdarstovnur. Nýggi ábyrgdarstovnurin skuldi veita trygd fyri veðskuld hjá lutaíbúðafeløgum, og veita pensjónistum lán til bjálving og orkusparandi tiltøk. Sum liður í hesari tilgongd var somuleiðis ætlanin, at sethúsalánsporteføljа Húsalánsgrunsins varð seld.

Landsstýrismaðurin kunnaði eisini um, at eitt uppskot til samtyktar um framhaldandi tilgongdina við Húsalánsgrunninum v.m. fór at verða lagt fyri Løgtingið "í næstum". Lógaruppskot um lutaíbúðafeløg varð lagt fyri Løgtingið í oktober 2007. Lutaíbúðafeløgini eru ætlað at verða karmur um alternativa bústaðarbygging, sum politiskar ætlanir hava verið um at fremja.

2008 Vísandi til, at tað nú er landsstýrismaðurin í fíggjarmálum, sum umsitur Ll. nr. 118 frá 18. juni 1997 "um Húsalánsgrunn o.a.", hevur Landsgrannskoðanin spurt, hvat síðani er hent í málinum, og hvørjar ætlanir landsstýrismaðurin hevur.

Í november 2008 hevur landsstýrismaðurin í fíggjarmálum boðað frá, at málsøkið í vár er flutt frá landsstýrismanninum í almanna- og heilsumálum til landsstýrismannin í fíggjarmálum. Nýggjur landsstýrismaður er settur í september, og tá ið hann hevur havt møguleika at sett seg inn málið, fer hann at taka støðu til, hvussu arbeiðið skal halda áfram.

## 5.2 Tilknýti til fíggjarlóg og landsroknskap

2001 Í november 2001 læt Fíggjarmálaráðið úr hondum eitt álit "um landsstovnar og –grunnar, tilknýti til fíggjarlóg, landsroknskap og grannskoðanarviðurskifti".

Niðurstøðan í álitinum er m.a., at Húsalánsgrunnurin er ein landsstovnur, og at tað er í stríð við stýrisskipanarlógina, at grunnurin ikki verður tikin við á fíggjarlógina og í landsroknskapin. Álitið vísir á, at í heilt serligum førum

kann Løgtingið tó við lóg samtykkja at hava virksemið uttanfyri fíggjarlógina.

2003 Í oktober 2003 boðaði landsstýrismaðurin frá, at hann hevði gjørt av at leggja Húsalánsgrunnin og Íbúðagrunnin saman og at skipa tann endurskipaða Húsalánsgrunnin eftir sama leisti sum Føroya Realkreditstovn.

2004 Í januar 2004 boðaði landsstýrismaðurin frá, at hóast løgtingsval varð útskrivað 5. desember 2003, varð arbeitt víðari við teimum lógarbroytingum, ið snúði seg um tilknýtið hjá Húsalánsgrunninum til fíggjarlógina.

2005 Í januar 2005 kunnaði landsstýrismaðurin um, at málið var partur av einum størri pakka, sum fevndi um nógvar grunnar, ið flestu landsstýrismenn varðaðu av. Viðvíkjandi Húsalánsgrunninum var ætlanin, at málið skuldi verða loyst við at endurskipa grunnin. Málið var til politiska viðgerð.

2006 Í januar 2006 og aftur í januar 2007 boðaði landsstýrismaðurin frá, at málið at umskipa Húsaláns-, Íbúða- og Bjálvingarstuðulslánsgrunnarnir til eitt partafelag ætlandi fór at verða loyst.

2007 Í oktober 2007 boðaði landsstýrismaðurin frá, at málið verður loyst sum partur av arbeiðinum at taka av og endurskipa Húsalánsgrunnin.

2008 Sum víst á frammanfyri, hevur landsstýrismaðurin í november 2008 greitt frá, at tá ið hann hevur havt møguleika at sett seg inn málið, fer hann at taka støðu til, hvussu arbeiðið skal halda áfram.

## 5.3 Strika heimildir til lántøku

1999 Vísandi til uppskot til samtyktar um at góðkenna roknskapin hjá m.ø. Húsalánsgrunninum – Lm. nr. 16/13 1998 – sum varð samtykt 13. apríl 1999, varð mælt til, at heimildirnar til lántøku í § 4 og § 17 í Ll. nr. 118/1997 vórðu strikaðar.

2001 Í februar 2001 boðaði landsstýrismaðurin frá, at Húsalánsgrunnurin átti ikki at kunna taka lán uttan við heimild í løgtingslóg. Tí fór í uppskotinum um nýggja lóg fyri Húsalánsgrunnin at verða miðað ímóti at strika verandi heimildir.

2003 Í januar 2003 kunnaði landsstýrismaðurin um, at ætlanin var at greiða hesi viðurskifti, samstundis sum Húsalánsgrunnurin varð umskipaður.

2004 Í januar 2004 boðaði landsstýrismaðurin frá, at tá løgtingsval varð útskrivað 5. desember 2003, var stígur komin í lóggávuarbeiðið.

2005 Í januar 2005 kunnaði landsstýrismaðurin um, at hesin spurningur skuldi verða avgreiddur sum partur av endurskipanini av Húsalánsgrunninum, sum var til politiska viðgerð.

2006 Í januar 2006 og aftur í januar 2007 boðaði landsstýrismaðurin frá, at málið ætlandi fór at verða loyst við at umskipa Húsaláns-, Íbúðar- og Bjálvingarstuðulslánsgrunnarnir til eitt partafelag.

2007 Í oktober 2007 boðaði landsstýrismaðurin frá, at málið verður loyst sum partur av arbeiðinum at taka av og endurskipa Húsalánsgrunnin.

Í november 2007 legði landsstýrismaðurin fram “Uppskot til samtyktar um at endurskipan av Húsalánsgrunninum” (Lm. nr. 103/2007):

> *“Løgtingið tekur undir við, at Húsalánsgrunnurin verður avtikin við lóg og endurskipaður sum ein ábyrgdarstovnur, ið skal veita trygd fyri rentu av ávísari veðskuld hjá lutaíbúðafeløgum, sum er veitt av fíggingarstovnum. Løgtingið tekur somuleiðis undir við, at ábyrgdarstovnurin eisini skal veita pensjónistum avdráttarfrí lán til bjálving og orkusparandi tiltøk.”*

Uppskotið fall burtur, tí at løgtingsval varð skrivað út 6. desember 2007.

2008 Í november 2008 hevur landsstýrismaðurin í fíggjarmálum greitt frá, at tá ið hann hevur havt møguleika at sett seg inn málið, fer hann at taka støðu til, hvussu arbeiðið skal halda áfram.

## 6. Viðmerkingar frá løgtingsgrannskoðarunum

Í uppskoti til samtyktar at góðkenna roknskapin hjá Húsalánsgrunninum fyri fíggjarárið 2005, ið varð lagt fyri Løgtingið 13. mars 2007, høvdu løgtingsgrannskoðararnir hesar viðmerkingar:
*“Vísandi til gongdina í málinum hava skiftandi landsstýrismenn í áravís boðað frá, at ivamálini:*

- *um lóg og virksemi grunsins,*
- *um tilknýti til fíggjarlóg og landsroknskap, og*
- *um heimildir til lántøku,*

*væntandi fóru at verða loyst við lógarbroytingum “um stutta tíð” í sambandi við eina ætlaða umskipan av grunninum. Enn er einki lógaruppskot lagt fyri Løgtingið til støðutakan.*
*Løgtingsgrannskoðararnir átala enn einaferð, at so long tíð gongur, uttan at málini fáa ein enda.”*

Hóast 10 ár eru liðin síðani landsstýrismaðurin kunnaði um, at ætlanir vóru um at gera ávísar broytingar í lógini, og at Løgtingsgrannskoðararnir í 1999 settu spurnartekin við, um grunnurin tænti sínum upprunaliga endamáli, er lógargrundarlagið tað sama enn. Løgtingsgrannskoðararnir átala harðliga, at ongar broytingar eru framdar, hóast hesi viðurskifti eru umrødd í áravís.

**Løgtingsgrannskoðararnir, 29. januar 2009**

Heini O. Heinesen, formaður

Magni Laksáfoss, næstformaður

Anfinn Kallsberg

Mikkjal Sørensen